

**21 ára gamla Sunneva Háberg Eysturstein er ein eldsál. Tá ið tú prátar við hana, merkir tú, at hon veruliga brennur fyri tí, sum hon tekst við. Síðan 2003 hevur hon verið við í fyriskipanini av G! festivalinum, men í ár hevur hon fingið ein størri leiklut í stóra tiltakinum. Nú er hon samskipari av G! festivalinum – ein uppgáva sum krevur alla hennara orku.**

## Sunneva Háberg Eysturstein – Samskipari av G!:

# Eg elski tónleiG!

**Rókur Jákupsson Jakobsen**
**rokur@sosialurin.fo**

**Eitt val**

Tey sum fylgdu við tónleikalívinum í Føroyum fyri nøkrum árum síðan, minnast kanska bólkin "Mary's Baby". Tað var Sunneva Háberg Eysturstein, sum røkti tangentarnar í hesum rokkbólki. "Eg elski tónleik. Eg elskaði at spæla tónleik, men eitt tað fyrsta eg lærdi av G! var, at tað er ov tungt at bæði skipa fyri og at spæla tónleikin. Tískil kendi eg á mær, at eg mátti velja um eg vildi fyrireika ella spæla, og her valdi eg at fyrireika tónleikatiltøk. Hetta valið tók eg tí, at tað er so nógvur fantastiskur tónleikur í Føroyum, og tað eru ov fá sum nøra og røkja hann. Tí vildi eg gjarna arbeiða fyri tónleikinum", sigur Sunneva við Planet. "Um nakar spyr meg um míni áhugamál, so er tónleikur tað fyrsta eg nevni".